Atlantic Airways Cup:

# Martin Poulsen er nýggja stjørnuskotið



*Bert 19 ára gamli havnarmaðurin, Martin Poulsen, er nýggjur FM vinnari í talvi fyri einstaklingar*

**Í kappingini um IM-normin, gjørdust føroyingarnir ov stuttir á hesum sinni. Misjøvnu úrslitini tíðliga í kappingini høvdu við sær, at vónirnar til IM-normin tíðliga fjaraðu burtur**

TALV
*Páll Holm Johannesen*

Ungi havnarmaðurin, Martin Poulsen, er nýggi føroyameistarin í talvi fyri einstaklingar. Um páskirnar hevur FM verið í talvi, og leygardagin vórðu seinastu leikirnir fluttir. Seks útlendingar hava luttikið í FM-kappingini í ár, og vóru tað eisini hesir, ið endaðu á trimum teimum fremstu plássunum.

Kappingin varð skipað so, at fremsti føroyingurin varð kosin til FM-vinnara. Eftir seinasta umfarið leygardagin vóru tríggir teir fremstu føroyingarnir ájavnir í stigum. Martin Poulsen, Ólavur Simonsen og Flóvin Tór Næs endaðu allir á fjóðra plássi í samlaðu kappingini við seks stigum av ellivu møguligum

FM-heitið varð avgjørt við kviktalvum, har teir tríggir telvararnir fingu 25 minuttir at umráða seg í. Martin vann bæði á Ólavi og Flóvini, og kann nú kalla seg føroyameistara 2003 fyri einstaklingar í talvi.

Undan seinasta umfarinum var tað annars Hans Kristian Simonsen, ið lá best fyri í FM-kappingini, men hann tapti óvæntað fyri Carl Eli N. Samuelsen í seinasta umfarinum, og megnaði sostatt ikki at endurvinna FM-heitið.

### Telvar burturav

Hetta er fyrstu ferð, at bert 19 ára gamli Martin Poulsen vinnur FM-heitið. Martin hevur seinasta hálva árið telvað burturav, og hetta val tykist nú geva úrslit. Nýkosni FM-vinnarin hevur gjørt stór framstig, og má sigast at vera nýggja stjørnuskotið í føroyska talvheiminum

Í fjør var tað ungi kollfirðingurin Hans Kristian Simonsen, sum vann FM, so ikki kann sigast annað, at teir ungu telvararnir rættiliga bíta frá sær.

Bæði Martin og Hans Kristian hava luttikið í fleiri kappingum uttanfyri Føroyar seinasta vetur, og skoðsmálini til teirra er, at teir eru sera evnaríkir og gera stór framstig.

### Eingin IM normur

Eitt av endamálunum við at bjóða útlendingum við til FM-kappingina í ár var at geva føroyingunum møguleika at ogna sær IM norm. Eftir fyrstu umførini gjørdist greitt, at tað fór at gerast tungt, tí úrslitini vóru ov misjøvn.

Eftir seinasta leikin leygardagin kundu føroyingarnir staðfesta, at teir gjørdust ov stuttir hesa ferð, og tí má næsti IM-normurin hjá føroyingum bíða. Í løtuni eru Flóvin Tór Næs og John Arne Nielsen einastu føroyingarnir, ið kunnu breggja sær av at hava IM-norm.

### Ovfarnir útlendingar

Útlendsku telvarar søgdu seg verða ovfarnar av føroyskari telving. Teir báðir, ið endaðu á fremstu plássunum, danin Kim Pilgaard og skotin John Shaw, eru báðir stórmeistarar, men hóast henda styrkismun, so smæddust føroyingarnir ikki burtur.

Bæði Martin Poulsen og Hans Kristian Simonsen fingu javnt ímóti John Shaw, og Heini Olsen fekk eisini javnt ímóti vinnaranum av kappingini Kim Pilgaard. Javnleikurin hjá Heini Olsen ímóti Kim Pilgaard var ein av glottunum hjá klaksvíkinginum, sum ikki hevði ein góða kapping í ár.

Útlendingarnir høvdu á orði eftir kappingina, at fleiri av føroysku telvarunum telvaðu væl betri, enn teirra styrkistal, og teir søgdu seg vænta nógv av føroyskari telving í framtíðini.

## FM 2003 Atlantic Airways Cup

**Endaliga støðan eftir 11 umfør**

| Landsliðsbólkurin | Rating | Stig |
|---|---|---|
| Kim Pilgaard | 2440 | 9 |
| John Shaw | 2474 | 8,5 |
| Eirik Gullaksen | 2354 | 7 |
| Saevar Bjarnason | 2258 | 6 |
| Martin Poulsen | 2239 | 6 |
| Flóvin Tór Næs | 2324 | 6 |
| Ólavur Simonsen | 2250 | 6 |
| Hans Kristian Simonsen | 2224 | 5,5 |
| Heikki Westerinen | 2360 | 5,5 |
| Carl Eli N. Samuelsen | 2142 | 5 |
| Christan Jepson | 2412 | 5 |
| Heini Olsen | 2278 | 4,5 |
| Eyðun Nolsøe | 2220 | 4,5 |
| Joan Hendrik Andreasen | 2106 | 4 |
| Torbjørn Thomsen | 2212 | 3 |
| Finnbjørn Vang | 2006 | 2,5 |

FM-plássini innanhýsis

| Landsliðsbólkurin | Stig |
|---|---|
| Martin Poulsen | 6 |
| Ólavur Simonsen | 6 |
| Flóvin Tór Næs | 6 |
| Hans Kr. Simonsen | 5,5 |
| Carl Eli N. Samulsen | 5 |
| Eyðun Nolsøe | 4,5 |
| Heini Olsen | 4,5 |
| Jóan H. Andreasen | 4 |
| Torbjørn Thomsen | 3 |
| Finnbjørn Vang | 2,5 |



*FM-vinnarin í fjør, Hans Kristian Simonsen, lá best fyri í kappingini undan seinasta umfarinum, men hann tapti óvæntað fyri Carl Eli N. Samuelsen, og gjørdist tí ov stuttur í ár*



*Í kappingini hjá unglingum varð eisini neyðugt við umdysti um FM heitið, eftir at Rani Baldursson og Sjúrður Thorsteinsson endaðu javnir. Rani vann eftir tveir umdystir, 1,5-0,5, og vann harvið FM-heitið fyri unglingar 2003*

# Stokkut gleði hjá rumena í B36

**Fyrrverandi rumenski landsliðsleikarin, Nicolae Zamfir, er ikki longur í hópinum hjá B36, men býr framvegis í Føroyum**

FÓTBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Rumenin í B36, Nicolae Zamfir, er ikki longur knýttur at 1.liðshópinum hjá havnarfelagnum. Rumenin hevur so at siga verið skaddur síðan hann kom til Føroya, og tí hevur leiðslan í B36 valt at siga samstarvið upp við rumenan.

Formaðurin í B36, Kristjan á Neystabø, vísur tó á, at rumenin er vælkomin at taka kappingina upp í B36, men tað verður ikki sum 1. liðsleikari. B36 hevur seinnu árini havt ringar royndir av útlendskum leikararum, og í fjør endaði samstarvið við miðvallarin, Din Sandu, eisini í úrtíð.

Sum skilst, so arbeiðir Nicolae Zamfir í Leirvík í løtuni, og hann ætlar sær ikki av landinum enn.